UTTAN ÚR HEIMI

## Fingið frágreiðingina

Norska stjórnin fekk í gjár eitt eintak av vápnafrágreiðingini, sum Irak herfyri lat ST.

Frágreiðingin, sum norðmenn hava fingið, er kortini bara 5000 síður. Tað merkir, at amerikanarar, russar, kinesarar, bretar, fransmenn og vápnaeftirlitsmenninir hjá St hava tikið einar 7.000 síður burtur, áðrenn teir hava latið norðmenn síggja frágreiðingina.

Noreg er limur í ST-trygdarráðnum, og norska stjórnin hevur fyrr kravt at sleppa at síggja alla frágreiðingina, men amerikanarar siga, at í frágreiðingini er ymiskt, sum onnur lond ikki eiga at fáa atgongd til.

Roknað verður við, at ST og altjóða kjarnorkustovnurin IAEA fara at koma við fyribilsmeting av iraksku frágreiðingini í dag.

## Bretar fyrireika seg til kríggj

Bretska verjumálaráðið boðaði fyrradagin frá, at stjórnin hevur tikið ta endaligu avgerðina um at flyta herútgerð og hermenn til Persaflógvan, og at myndugleikarnir eru farnir undir at leiga skip til flutningin.

Í einari kunngerð frá verjumálaráðnum varð sagt, at talan er um fyrireikingar, og at eingin avgerð um álop er tikin enn. Tað er heldur ikki avgjørt, hvussu nógvir bretskir hermenn skulu sendast til leiðina við Persaflógvan, stóð í kunngerðini. Kortini varð sagt, at tað er umráðandi at hava eina sterka herdeild tøka í økinum.

Formaðurin í verjunevndini hjá parlamentinum, Bruce George, sigur, at tað er neyðugt at fyrireika seg væl, skuldi kríggj brostið á við Irak, og allar fyrireikingarnar eru minni enn so lidnar enn, sigur hann.

## Muturgøla hóttir Sharon

Ísraelski forsætisráðharrin lovaði í gjár at rudda í Likud-samgonguni eftir eina muturgølu, sum kann hótta starv hansara sum formaður í samgonguni, og sum eisini kann forða fyri, at hann verður forsætisráðharravalevni, tá ísraelsmenn skulu á tjóðartingsval í næsta mánað.

Málið byrjaði seinasta leygardag, tá ríkisákærin gav løgregluni boð um at kanna skuldsetingar um, at limir í aðalstjórnini í Likud kravdu pengar frá valevnunum aftur fyri at styðja tey, tá formansval var í flokkinum herfyri.

Sharon sigur, at verður nakar limur í aðalstjórnini funnin sekur, skal hann úr flokkinum alt fyri eitt. Øll neyðug stig verða tikin, sigur Likud-formaðurin.

## Tindasvín oyða fuglin

Skotsku myndugleikarnir hava nú gjørt av at drepa 5.000 tindasvín á oynni Uist í teimum ytru Hebridunum.

Í 1974 varð avgjørt at flyta tindasvín út í oynna fyri at steðga teimum nógvu sniglunum, sum vóru farnir at gera um seg. Tað vísti seg tó skjótt, at tindasvínini nørdust ógvuliga skjótt. Nógvur fuglur heldur til á Uist, og tá eggini tykjast vera góð føði hjá tindasvínunum, hava myndugleikarnir gjørt av at avmarka talið á tindasvínunum fyri at bjarga fuglinum.

Enn er tiltakið ikki sett í verk, tí ein djóraverndarfelagsskapur hevur boðið sær til at fanga tindasvínini og at flyta tey inn á meginlandið, men vísindafólk eru ímóti hesum, tí tey siga, at tað er djórapínsla at flyta tindasvínini inn á skotska meginlandið.

# Bush fer nú at byggja rakettverjuskipan



*George W. Bush, forseti heldur nú vallyfti sítt um eina rakettverjuskipan, sum skal verja USA, tess sameindu og tess vinir ímóti álopum úr londum sum Norðurkorea, Irak og Iran*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanska verjan hevur nú fingið boð um at fara undir ta nógv umrøddu rakettverjuskipanina. Fyrsti partur skal standa klárur um tvey ár**

RAKETTVERJUSKIPAN
*Árni Joensen*

Í seinasta lagi í 2004 skulu tær fyrstu tíggju verjurakettirnar standa klárar við Fort Greely-herstøðina í Alaska, og innan 2006 skulu tíggju rakettir av sama slagi setast upp har.

Við hesarð avgerðini heldur George W. Bush, forseti eitt tað týdningarmesta av sínum vallyftum, og boðskapur hansara í dag er tann sami sum undan valinum fyri tveimum árum síðani.

- Tað frøir meg, at vit nú taka eitt týdningarmikið stig til at forða hóttanum ímóti okkum. Rakettverjuskipanin skal verja USA, okkara sameindu og okkara vinir, segði Bush, tá hann kunngjørdi avgerðina.

Sjálvur sigur forsetin, at í fyrsta umfari er talan um eitt lítið stig á leiðini, men at tað kortini fær stóra ávirkan á landsins verju. Síðani er ætlanin at halda fram við atliti til ta tøkniligu menningina og viðurskiftini í heiminum annars, sigur hann.

Undir valstríðnum upp undir forsetavalið lovaði Bush, at hann ætlaði sær at halda fram við tí arbeiði, sum varð sett í verk, tá Ronald Reagan var forseti. Tað var í 1983, at Reagan kom við teirri sokallaðu stjørnukrígsætlanini, sum tó ongantíð kom longur enn á borðið.

Fyri einum hálvum ári síðani gjørdi USA av at ógilda ta 30 ára gomlu ABM-avtaluna við Sovjetsamveldið, tí hon forðaði USA og Russlandi at gera rakettverjuskipanir. Talsmenn hjá stjórnini í Washington hava seinni sagt, at so skjótt avtalan var uppsøgd, fekk herurin boð um at fara undir neyðugar fyrireikingar á Fort Greely-herstøðini í Alaska.

Russland og Kina hava funnist at teirri ætlaðu rakettverjuskipanini. Sjálvur hevur Bush sagt, at tað eru ikki russar og kinesarar, sum hótta USA, men heldur lond sum Norðurkorea, Iran og Irak. Harafturat kemur vandin fyri álopum frá yvirgangsfelagsskapum.

Amerikanska verjan hevur higartil gjørt átta royndir við skipanini. Tann seinasta, sum var fyri einari viku síðani, miseydnaðist, men sagt verður, at tríggjar av teimum átta royndunum gingu eftir ætlan.

- Royndirnar hava víst, at tað gongur tann rætta vegin, sigur Paul Wolfowitz, varaverjumálaráðharri. Saman við Bush og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharra er hann heitur talsmaður fyri rakettverjuskipanini.

# Vinstrasinnaðir sviar skrásettir og undir eftirliti

**Meiri enn 100.000 sviar eru vorðnir skrásettir og hava verið undir eftirliti orsakað av politiskari sannføring**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*

Hetta stendur at lesa í einari frágreiðing, sum varð almannakunngjørd í Stockholm fyrradagin.

Nevndin, sum hevur skrivað frágreiðingina, finst hvassliga at skrásetingini. Sagt verður eisini, at í nógvum førum hevur skrásetingin eisini verið tilvildarlig og uttan stórvegis kanningar.

- Talið á skrásettum er nógv størri enn fyrr hildið, og bæði løgreglan, dómstólar, almennir ákærar og løgfrøðiligir serfrøðingar hava gjørt seg inn á tað persónliga frælsið hjá nógvum, sum hava verið politiskt virkin á svenska vinstravonginum, stendur at lesa í teirri 3000 síður stóru frágreiðingini.

Í sínum kanningum hevur nevndin kanna virksemið og skjøl hjá bæði sivilum og hernaðarligum fregnartænastum. Harafturat hevur hon avhoyrt næstan 400 fólk, sum hava givið frágreiðing undir revsiábyrgd.



# Koyrandi til Gásadals leygardagin



*Leygardagin er ikki neyðugt at ganga til Gásadals. Solberg Henriksen skal trýsta á knøttin, sum byrjar eitt nýtt tíðarskeið í søguni hjá næstan útdeyðu bygdini. Her verða nakrar av síðstu fyrireikingunum gjørdar*

**Leygardagin verður síðsta skotið í Gásadalstunlinum latið av, og sostatt verður koyrandi til bygdina**

SÍÐSTA SKOT
*Heri á Rógvi*

Leygarmorgunin kl. 11 trýstir gamli postmaðurin í Gásadali, Solberg Henriksen, á knøttin, sum sprongir ígjøgnum í tunlinum til Gásadals.

Harvið verður koyrandi til síðstu bygdina á Vágoynni.

Hetta upplýsir Óli Petersen frá Landsverkfrøðinginum fyri Sosialinum.

Fólk í Gásadali kunnu nú – eftir at tey skuldu upp um fjalli til gongu í nógv ár – koyra úr bygdini, og við undirsjóvartunlinum kunnu fólkini koyra allan vegin inn í Eysturoynna.

Arbeitt hevur verið við at gera tunnilin í tvey ár, men ynski er nógv eldri enn so.

Landsverkfrøðingurin skipar fyri hátíðarhaldi í sambandi við síðsta skotið leygardagin.

Smyrjibreyð verður at fáa í høllini, sum Landsverkfrøðingurin hevur nýtt til arbeiðið.

Ein bilur við Solberg Henriksen og Landsverkfrøðinginum, Oyvindi Brimnes, fer at koyra úr Gásadali gjøgnum tunnilin fyrsta túrin. Við tunnilsmunnan Bíggjar megin tekur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, ímóti, og fer hann har at halda røðu.

Onnur fólk sleppa eisini royna at koyra gjøgnum tunnilin, upplýsir Óli Petersen.

Hóast tað nú er opið ígjøgnum, so er arbeiðið langt frá liðugt við Gásadalstunlinum.

3 milliónir eru játtaðar til arbeiðið komandi ár, og fara hesir pengarnir til at styrkja loftið í tunlinum.

Higartil eru tjúgu milliónir kr. nýttar til arbeiðið, og tørvar er á góðum tjúgu milliónum afturat fyri at gera arbeiðið liðugt. Hetta arbeiðið er íroknað vegagerð í Gásadali og asfaltering av tunlinum.

Í komandi ári verður einki av elektriskum arbeiði gjørt, eingin vegagerð í Gásadali og heldur ikki verður tunnilin asfalteraður fyrr enn í 2004 ella seinni, tá peningur verður játtaður.

Í fyrsta lagi eftir, at loftið í tunlinum er styrkt, ber til hjá almenninginum at koyra ígjøgnum regluliga.

Lesið reportasju úr Gásadali í Sosialinum leygardagin.

# Eimskip flytir í nýggja bygningin

**Vit flyta inn í nýggja skrivstovu- og pakkhúsbygningin 19. desember 2002.**

FARMAFLUTNINGUR

Hin 6. juni í ár settu starvsfólkini hjá Eimskip spakan í úti á Skansabryggjuni. Longu 11. oktober var reisigildi á skránni, og í dag sæst tann 1.500 fermetra stóri og 12,5 metra høgi bygningurin úr flest øllum hernaðshornum í Havn.

– Talan er um ein framkomnan bygning við øllum teimum nýggjastu hentleikum innan goymsluøkið. Stórur dentur er lagdur á góðsku, soleiðis at Eimskip kann bjóða sínum viðskiftafólki eina nýmótans vøruhandfaring. Bingjurnar verða framyvir fyltar og tømdar inni í vørugoymsluni. Tær verða koyrdar heilt til dyrnar og tømdar ígjøgnum serligar dyr fyri bingjur, skrivar Eimskip í tíðindaskrivi.

Hetta hevur við sær, at vøran ongantíð kemur at standa úti í regni og vindi og verður lítið handfarin. Á henda hátt kann Eimskip tryggja bestu viðferð av vøruni.

Vøruhotel og goymslustýring er ein tænasta, Eimskip nú bjóðar kundunum. Nýggju umstøðurnar á Skansabryggjuni gera tað møguligt at bjóða goymslutænastur á hædd við tær, vit kenna uttanlands.

– Tørvar viðskiftafólki goymslupláss, ber tað nú til at leiga seg inn í pakkhúsbygningin og brúka hann til goymslu. Harafturat bjóðar Eimskip eisini goymslustýring á vøruhotellinum. Fær ein kundi eina stóra sending til landið, leggur hann hana í vøruhotellið. Tá so brúk er fyri henni, kann Eimskip koyra hana á rætta stað – ein part nú og annan tá, sigur flutningsfelagið.

Umframt vøruhotel og vanliga vørugoymslu hevur Eimskip eisini frígoymslu í nýggja pakkhúsinum. Vøra kann goymast ótollað í frígoymsluni, til hon verður tikin út eftir tørvi. Tað sparir kundanum gjaldføri, og kann hann senda vøruna av landinum aftur ótollaða, um hann ikki fær brúk fyri henni.

Vøran kann liggja á frígoymslu hjá Eimskip upp í 3 ár – alt eftir tørvi og goymsluhentleikum hjá tí einstaka.

Við hesum vil Eimskip bjóða viðskiftafólki sínum eina framkomna og trygga flutningstænastu á hædd við fremstu flutningstænastur í heiminum.

## Jólacafé við livandi tónleiki

**Mentanarhúsfelagið og Pensjónistafelagið skipa fyri Jólacafé í hølunum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini í Saltangará**

JÓLAHUGNI
*Vilmund Jacobsen*



*Frá í dag og fram til sunnukvøldið, 22. desember, verður Jólacafé í Saltangará.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í dag, hósdagin, 19. desember, letur Jólacafé upp í hølunum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini í Saltangará.

Café'in verður opin hvønn dag til og við sunnudagin, 22. desember, og opið verður frá kl. 16-21.

Á Jólacafé'ini kanst tú keypa tær ein heitan kaffimunn við mandlurísi ella holukøkum aftur við.

### Livandi tónleikur

Hvørt kvøld verður livandi tónleikur at hoyra frá kl. 19.

Í kvøld undirhalda Søren, Hjalti og aðrir. Fríggjakvøldið skipa Morid, Maria, Joan og onnur fyri undirhaldinum, og leygarkvøldið syngur gentubólkurin hjá Duritu, Drós og Ester. Sunnukvøldið verða Søren, Hjalti og aðrir aftur at hoyra.

Tey, sum skipa fyri Jólacafé'ini í Hæddini, eru Mentanarhúsfelagið og Pensjónistafelagið.

### Øll vælkomin

Hugskotið við Jólacafé'ini er, at fólk, sum hava verið ein hugnaligan innkeypstúr í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar kommunu, skulu fáa høvi at seta seg niður eina løtu við einum heitum kaffimunni og livandi tónleiki.

Mentanarhúsfelagið og Pensjónistafelagið bjóða øllum at vera hjartaliga vælkomnum inn á gólvið.